– trygt og ómakaleyst til hús

# Íbúð ella hús?



Her fært tú bæði, og alt er sum nýtt.









## Uttan

Íbúðin er í væl bygda íbúðarbygninginum, ið liggur sera væl fyri í náttúruvakra umhvørvinum við Klingruna í Hoyvík. Stutt er oman í býin við bili ella við bussi, og dagstovnar, sparkivøllur, býlingshús, skúlar og handlar eru nær við. Sera frálíkt panoramaútsýni er úr allari íbúðini norðureftir inn í Skálafjørðin og eystureftir og suðureftir yvir Hoyvík, Nólsoynna og yvir allan Nólsoyarfjørð. Túnið er lagt við flísum og asfalti, og alt er gjørt liðugt uttanum, so lítið er at halda. Betondekk er millum hæddirnar og betonveggir millum íbúðirnar, so har er sera friðarligt, og lítið og einki hoyrist millum.

## Innan

Stóra íbúðin er í 2 hæddum. Niðara hædd er uml. 47 m2 og ovara hædd uml. 40 m2 – í alt uml. 87 m2. Hon sera væl innrættað, og alt er gjørt úr besta tilfari við besta handverki. Hartil er íbúðin sera væl hildin, og tí at kalla sum nýggj. Tú kennir teg næstan ikki sum inni í eini íbúð, men heldur sum í einum húsum, tí rúmini og hæddirnar fáa teg at kenna, at alt er størri enn tað kanska í veruleikanum er. Alt er ljóst og frískligt, men eisini hugnaligt og fjálgt. Stóru vindeyguni taka nógv ljós inn og skapa eitt gott samband millum inni og úti, millum innara og ytra umhvørvið.

## Innrætting

Í niðaru hædd er inngongd, durur / gongd, bryggers / vaskirúm, gesta-wc, køkur / borðsstova / stova og goymslurúm. Í ovaru hædd er trappugongd, klædnarúm, baðirúm og 3 kømur. Hartil er stórt ovastaloft / goymslurúm við gólvið í.

## Fakta

**Addressa:** ...........Niðaragøta 2-11,
.............................Hoyvík
**Byggiár:** .............2003
**Hæddir:** ..............2 + ovastafoft
**Gólvvídd:** ............87 m$^2$
**Prísuppskot:** ...... kr. 1.750.000











PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**